# Nøvn

## Minningarorð um mína høgt elskaðu ommu Jóhannu Eysturtún

Tað var við tungum hjarta tá eg í 1990, sat og skrivaði minningarorð um mín elskaða abba, men tað føløst ikki minni tungt nú, at skula skrivað minningarorð um teg elskaða omma.

Tað merktist eitt stórt tómrúm í tykkara heimið, tá abbi doyði, men tómrúmið følist størri nú, av tí at húsið stendur tómt, at eg ikki bara líka kann koma forbí og fáa eitt gott prát, og tann drekkamunnin, sum tú altíð vart klár at servera. Tað er ein løgin kensla, at tú ikki ert ímillum okkum longur.

Hvørja ferð vit komu til Havnar og parkeraðu í túninum hjá mammu og babba, var tað fyrsta genturnar søgdu: mamma, kom líka ein túr niðan til langommu, tær vistu sum var, at tú altíð tókst væl ímóti okkum, og so skjótt tær komu inn, bleiv sett keks, bomm og saft a borðið til børnini, og so í skápið at finna leikutoy fram aftaná, tað er eisini eitt stórt tómrúm hjá teimum, og ringt at skilja at tær ikki skulu síggja teg aftur her, tí tú ert farin heim til Jesus pápa at búgva nú.

Eg sakni so nógv at kunna ringja til tín og at vitja teg, tí tú vart altíð klár at geva ráð um ástøð. Tað var mangan at eg ringdi og spurdi teg hvussu veðrið fór at vera í morgin, tí eg hevði gloymt at lurta eftir útvarpinum, tá flenti tú altíð, og segði so skemtliga: nú góða, hevur tú nú aftur gloymt at lurta, men so kom ein góð veðurfrásøgn, og altíð eitt gott prát.

Tað er nógv gott eg kundi skriva um teg, elskaða omma, tí tú vart eitt so vælsignað gott menniskja, saknurin er ómetaliga stórur, men mín uggi er at vit ein dag skulu møtast aftur heima í Himli, hjá tí frelsara, sum vit hava sett okkara álit á.

Má Harrin signa okkum øll ið eftir sita, hugsi nógv um tykkum góða mamma, babba, gumma, Hans, Majkin (mostur) og Jónleivur v/fam.

Hvíl í friði mín elskaða omma, takk fyri alt sum tú hevur verið fyri meg, Karl og genturnar.

**Heidi**



## Tankar um Jórun!

Ein kvinna fer gangandi eftir Ringvegnum við títtum, røskum fetum – myrk og sera vøkur á at líta.

Kvinnan er Jórun Askham, okkara mentor og fyrimynd, og helst ein av mest vitandi persónum í Føroyum innan cardiologi, kanska serliga kvinnum og hjartasjúkum. Sjálvsagt var tað hon, ið tók stig til at seta FÁ 8 á stovn í 2006. FÁ 8 er ein »undirbólkur« innan Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, ið er fyri sjúkrarøktarfrøðingar, ið starvast innan cardiologiska økið.

Jórun gav fegin av sínu stóru vitan, og hennara undirvísing, ið var merkt av nærlagni, gløgni, nýhugsan og ikki minst humor, var altíð sera áhugaverd og kveikjandi .....

Soleiðis minnast vit Jórun Askham, so livandi, frísk og glað.

Fyri fáum árum síðani skrivaði Jórun masterritgerð um kvinnur og hjartasjúkur. Hendan ritgerð kom fyri kortum í altjóða tíðarritið Journal of Clinical Nursing. Heitið er »The information and support needs of Faroese woman hospitalised an acute coronary syndrome«.

30. mai 2010 skrivar Hanne Valhøj Poulsen úr Randers, sum er Master of Health Nursing, teldupost til okkara sjúkrarøktarstjóra Nainu Túgvustein, at hetta er ein sera flott plasering fyri føroyska sjúkrarøktargransking í altjóða høpi, og hevur sera stóran týdning fyri sjúkrarøktarfakliga økið í Føroyum. So vit eru sera stolt av avrikinum, sum Jórun hevur gjørt, og ynskja hennara familju til lukku við tí. Jórun visti av, at tað fór at verða góðkent til publikatión, men tíverri náddi hon ikki at síggja tað útgivið. Og tað harmar okkum almikið.



*Mynd: Tórfinn Smith*

Vit hava mist so ótrúliga nógv við Jórun, men tó hevur eingin mist eins nógv og hennara nærmastu, Niels, Rannvá og Durita, sum vóru henni so kær. Má Harrin troysta tykkum í hesi sváru tíð.

Vit minnast Jórun við stórari virðing.

**Nevndin í FÁ 8**
Marita Mørk Johannesen
Elin Winther Arge
Katrin á Lakjuni
Amy Ljósheim
Hanna Johannesen
Anna Maria Mortensen
Annika á Steig Egholm

## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá okkara góði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jóhan Chr. J. Foldbo**

doyði og varð jarðaður

Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar og gravarar. Takk til Báið á Lakjuni fyri vakran sang og til Niclas fyri troystarrík orð í kirkjuni. Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningargávur til Krabbameinsfelagið. Takk til tykkum sum bakaðu og hjálptu til við ervið. Takk til tykkum øll sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Kathrina, Jørmund, Sólgerð og Vagn við familjum***

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, góði pápi, abbi og verfaðir okkara,

**Oddni Róland Ólason Biskopstø**
**Klaksvík**

doyði og varð jarðaður

Tøkk til Hanus Á Gørðum, prest, fyri góð og troystarrík orð, tøkk til kirkjutænarar og sangarar, tøkk til øll, sum ringdu og komu inn á gólvið, tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar. Tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til á ymiskan hátt. Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
***Hannebeth, Birta, Rannvá, Erik, Óli, Høgni og Rógvi***